# Útróðrarbátar í Klaksvík hava smáligan fiskiskap

**Frægastu útróðrarbátarnir, sum royna við línu, liggja um 100 pund á línuna, og nógv tann størsti parturin av veiðini er hýsa. Onkur bátur eisini gjørt hampiliga setur eftir hvítingi**

ÚTRÓÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vit vóru á Kósabrúnni í morgun, tá ið útróðrarbáturin, Nevið Reyða, legði at landi. Teir høvdu roynt sunnanfyri – ella í Svínoyarhavinum, teir rópa. Á 30 línum høvdu teir millum 2.200 og 2.300 pund. Nógv tann størsti parturin av veiðini var hýsa, eini 200 pund var gráur fiskur.

Nevið Reyða er ein 32 fót stórur glastrevjabátur av slagnum, Viksund. Bátaeigari er Hendrik Sørensen, sum er ættaður av Viðareiði, men býr í Klaksvík.

Teir seta við trakt. Agnið er høgguslokkur og tað, sum rópt verður sauri. Hetta er ein sildafiskur, sum er væl bíligari enn makrelur.

Tveir mans eru við bátinum á útróðri, meðan ein tekur sær av umrekingini á landi.

Petur Juul Jacobsen, ið er annar av monnunum, sum við eru, sigur, at fiskiskapurin vanliga er smáligur hesa tíðina av árinum.



*Pól Fugløy, landingarformaður og Petur Juul Jacobsen, útróðrarmaður, sum júst er afturkomin við útróðrarbátinum, Nevinum Reyða*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*Nevið Reyða leggur at landi. Teir hava roynt í Svínoyarhavinum í nátt. Meginparturin av veiðini er hýsa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– Onkur annar bátur royndi norðanfyri okkum síðstu nátt, kanska nakað ytri, og teir fingu væl av hvítingi. Sum vit skiltu, hevði hesin báturin umleið 100 pund á línuni, harav meginparturin var hvítingur.

Útróðrarmaðurin letur væl at hýsuprísinum, sum munar væl, nú útróðurin er so slakur.

– Eg haldi, vit fáa einar 15 krónur í miðal fyri hýsuna, og tað er góður prísur. Annars liggur hýsuprísurin upp í einar 18 krónur fyri kilo, sigur hann.

Petur Juul Jacobsen sigur, at tað gongur væl hjá teimum at fáa línuna umriknað til hvønn túrin.

Nevið Reyða roynir við línu alt árið.

---

## Froya landar í Klaksvík

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun landar línuskipið, Froya, í Klaksvík.

Pól Fugløy, landingarformaður á Landingarmiðstøð Føroya, veit at siga, at teir hava millum 75.000 og 80.000 pund, meginparturin longa og brosma.

Línuskipið, Grani, landar í morgin. Teir hava eini 110.000 pund.

Seinni í vikuni koma Gáshøvdi, sum trolar uttan fyri og Varðin, sum trolar á landleiðini, inn at landa.

Línuskipið, Núpur, sum er undir Íslandi, kemur eisini inn at landa í vikuni.

Pól Fugløy væntar, at Núpur kemur hósdagin.

# Tjørnunes á lítlu beding í Klaksvík

**Bedingin hjá Klaksvíkar Skipasmiðju er eldri enn bedingin hjá Klaksvíkar Sleipistøð, hóast báðar hava sínar røtur tíðliga í farnu øld**

HANDVERKSVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Brunnbáturin, Tjørnunes, stendur í løtuni uppi á Klaksvíkar Skipasmiðju, sum lítla beding í Klaksvík verður rópt.

Tjørnunes er brunnbáturin hjá East Salmon. Hann er smíðaður hjá Brøðrunum Petersen í Fuglafiði og longdur á Tórshavnar Skipasmiðju.

Á lítlu beding skal Tjørnunes sýnast og hava aksiltrekk, og eisini verður báturin pussaður upp, meðan hann stendur á bedingini.

Bjaringarbáturin, Ziska, hevur eisini verið uppi á bedingini hjá Klaksvíkar Skipasmiðju, har hann er reinsaður og botnmálaður.

Ziska er júst farin av aftur bedingini.

### Gomul beding

Bedingin hjá Klaksvíkar Skipasmiðju er eldri enn bedingin hjá Klaksvíkar Sleipistøð, hóast báðar hava sínar røtur tíðliga í farnu øld.

Tað vóru Kjølbro og Dávur í Gerðum, skipari, sum løgdu lunnar undir ta størru bedingina í 1928 og Aksel Olsen og brøður hansara, sum løgdu lunnar undir lítlu beding longu í 1919.

Aksel var sonur Húsa-Pól.

Bedingin hjá Klaksvíkar Skipasmiðju er nú í triðja ættarliði og maðurin, sum stendur aftanfyri bedingina í dag, er Martin Olsen.

### Upp til 100 tons

Martin sigur, at teir plaga at vera fýra mans til arbeiðis á bedingini, men í løtuni eru teir tríggir.

– Vit taka skip og bátar upp, sum eru minni enn 100 tons.

Hann vísir á, at tað mesta, teir takast við á bedingini, er timburarbeiði, har timburskip verða umvæld.

Sjálvur er Martin útbúgvin skipstimbrari, og tá ið norðoyingar settu Dragan í stand, var hann maðurin, sum legði teimum lag á í fríløtunum.

– Um veturin er minni at gera, men um summarið er meira lív í á bedingini.

Martin Olsen sigur, at Klaksvíkar Skipasmiðja ger lítið við maskinumvælingar, men teir hava nógv aksiltrekk og annars uttanduraarbeiði við bátar og smærri skip.



*Á lítlu beding skal Tjørnunes sýnast og hava aksiltrekk, og eisini verður báturin pussaður upp, meðan hann stendur á bedingini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*